


## FUNDIR, TILTØK O.A. Í MAI:

**3. mai** vitjan av 15 næmingum og lærararum úr Glasi í Hoydølum.

**4. mai** vitjan av 45 næmingum og lærararum frá Glasi í Hoydølum.

**9. mai** til hátíðarhald og móttøku hjá russiska sendiharranum í sambandi við "Victory Day - wreath laying ceremony".

**15. – 19. mai** ísl. forsetin og forsetafrúan vitja í Føroyum.

**19. – 22. mai** vitjan av útlendska sendimanna-liðnum í Íslandi í Føroyum.

**23. mai** vitjan av og fund við formannin og stjóran í Landssamband fiskeldis-stöðva ("Ísl. Havbúnaðar-felagið").

24. **mai** vitjan av borgar-stjóranum og starvs-fólkunum í Þorlákshafnar kommunu.

**26. mai – 2. juni** kemur føroysk fyritøka at nýta hýsingarskipanina o.a. hjá Sendistovuni.

## KEFLAVÍKAR FLOGVØLLUR VÍÐKAST ALSAMT.

Flogvøllurin er í dag tríggjar ferðir størri enn tá ið hann varð bygdur í 1987, hóast hildið varð, at flogvøllurin var ríkiliga stórur tá. Í byrjanini var flogvøllurin 22.000 m² og 748.774 ferðafólk flugu um Keflavíkar Flogvøll. Tá vóru tað bert tvey flogfeløg, sum flugu til og frá flogvøllinum í Keflavík. Í dag er flogvøllurin 73.000 m² og roknað verður við, at 8.748.875 ferðafólk fara at koma gjøgnum flogvøllin í ár.

> *» Í 2016 vaks ferðafólkatalið við 40,3% og í ár verður roknað við, at vøksturin verður 28% í mun til 2016. Vøksturin í 2016 var so stórur, at flest aðrir flogvallir nýta uml. 10 ár at røkka einum so stórum vøkstri. «*

Keflavíkar Flogvøllur verður útbygdur fyri fleiri mia. íslendskar krónur hvørt ár og tær ætlanir, sum í dag liggja á borðinum, røkka fram til 2023.

Í juni í ár verða 7.000 m² afturat tiknar í nýtslu. Talan er eisini um parkeringspláss, sum trot hevur verið á eina tíð. Í hesum sambandi og í sambandi við stóra vøksturin í ferðafólkatalinum, verður m.a. brúk fyri eini 500 starvsfólkum afturat.

Í dag ber til, at flúgva til 78 ferðamál frá Keflavík (sí myndina niðanfyri), sum 27 flogfeløg røkja. Í 2007 var talan um 18 ferðamál og í fjør vóru tað 46 ferðamál, sum til bar at koma til og úr Keflavík.




*Mynd 1. 78 ferðamál, sum ber til at flúgva til og frá Keflavík.*

*Sí meira her (á enskum) og her (á enskum)*



Mynd 2. Íbúðar kostnaðurin í Reykjavík er vaksin við 21 % seinastu 12 mánaðirnar.

## ÍBÚÐARKOSTNAÐURIN Í REYKJAVÍK VAKS VIÐ 21% Í FJØR

Íbúðarprísirnir í Reykjavík eru hækkaðir støðugt, húsaprís vísitalið hækkaði 2,7% síðsta mánað, 7,1% síðstu tríggjar mánaðirnar, 12,3% síðstu seks mánaðirnar og í alt 20,9% síðsta árið.

Trot uppá íbúðir í Reykjavík verður nógv umrøtt í hesum døgum. Tað er sera ringt hjá ungum fólki at fáa endarnar at røkka saman, vegna høgu leigu- og húsaprísirnar. Yngra fólkið býr longur heima hjá foreldrunum nú enn fyrr. Fyritøkur sum IKEA og Blue Lagoon hava bygt hús til starvsfólk síni, fyri at hjálpa til við bústaðar trupulleikunum. Sambært eini nýggjari kanning hjá Íbúðalánasjóður (“Íslendski Húsalánsgrunnurin”) er tørvur á áleið 4.600 íbúðum í Reykjavík, og tað mugu byggjast umleið 9.000 íbúðir tey næstu trý árini, fyri at nøkta tí ovurstóra eftirspurninginum eftir íbúðum. Ein av orsøkunum til at tað er íbúðatrot er, at ikki hava verið bygdar nóg nógvar íbúðir seinastu árini. Ein onnur orsøk til at tað vantar fleiri íbúðir er, at áleið 1.600 íbúðir verða leigaðar út til ferðafólk, umframt tær íbúðirnar, sum ikki eru skrásettar til útleigan.

*Sí meira her (á enskum)*

## TOSKASTOVNURIN Í ÍSLANDI STØRRI ENN NAKRANTÍÐ



Mynd 3. Toskastovnurin er væl fyri.

Toskastovnurin í Íslandi er mettur at vera størri enn nakrantíð, síðan Havrannsóknarstovan í 1985 byrjaði at kanna mongdina av botnfiski, sambært frágreiðing frá Havrannsóknarstovninum um botnfiskastovnin undir Íslandi í februar og mars 2017. Miðal tyngdin av toski, eldri enn sjey ár, er hægri enn seinastu árini, men lægri hjá teimum yngru árgangunum. Vísitalið av toskastovninum er hækkað støðugt síðan 2007 og er nú hægri enn nakrantíð, síðan kanningar byrjaðu. Hetta kemst helst av vaksandi nøgdini av stórum toski. Stovnvísitølini av longu, toski og kongafiski vóru høg í mun til seinastu trý áratíggjuni.

Kanningin, sum tvey skip hjá Havrannsóknarstovninum og tveir trolarar tóku lut í, vísir eisini at útbreiðsla av ymsum fiskasløgum á Íslandsgrunninum er broytt nakað hesa tíðina, kanningar hava verið gjørdar. Hitastigið í havinum er í miðal høgt við havsbotnin, eins og tað hevur verið seinastu árini.

*Sí meira her (á íslendskum)*

## VERÖLD, HÚS VIGDÍSAR TIKIÐ ALMENT Í NÝTSLU



Mynd 4. Nýggi bygningurin, har Veröld, hús Vigdísar húsast.

Nýggi bygningurin, ið hýsir megindeild fyri fremmandamál og mentan, hevur fingið navnið “Veröld, hús Vigdísar”. Málstovnurin varð alment tikin í nýtslu fyrsta summardag, tann 20. apríl í ár. Rigmor Dam, landsstýriskvinna í mentamálum var boðin og flutti fram røðu. Eisini vóru føroysk embætisfólk, umboð fyri Fróðskaparsetur Føroya og Sendimaður Føroya í Íslandi boðin við til hátíðarhaldið. Gáva frá Føroyum varð latin málstovninum.

Málstovnurin er uppkallaður eftir Vigdís Finnbogadóttur, ið var forseti Íslands frá 1980-1996. Orsøkin til, at málstovnurin er uppkallaður eftir Vigdís er, at hon hevur arbeitt hart fyri at styrkja um gransking innan mál og frálæru í hesum.

Sebastian Drude verður fyristøðumaður í Vigdísar stovninum, ið verður rikin sambært avtalu millum íslendsku stjórnina og UNESCO. Vigdís Finnbogadóttir er UNESCO mál sendiharri .

Málkunnleiki er lykilin til at at skilja ymiskar mentanir, og av teirri orsøk, er endamálið við stovninum at læra og kunna um ymisk mál og mentanir, soleiðis at íslendingar kunnu standa seg væl í altjóða høpi. Málkunnleiki, mentan og samskifti er ein týðandi partur av alheimsgerðini og kann tað vera lykilin til góð framtíðar úrslit.

Vigdís Finnbogadóttir stovnurin fekk í 2010 peningagávu úr Føroyum, ið var við til at leggja lunnar undir, at verkætlanin kundi førast út í lívið. Fimm føroyskar fyritøkur góvu eina peningagávu áljóðandi 375.000 kr. tilsamans. Hesar fyritøkurnur vóru Framherji, Bank Nordik, Smyril Line, Atlantic Airways og Tryggingarfelag Føroya. Føroya Løgting gav eisini eina peningagávu áljóðandi 450.000 kr.

Føroyska málið fær eisini innivist í Veröld, húsi Vigdísar.

*Sí meira her (á íslendskum)* og her (á fleiri málum)

## NÝTT FØROYSKT FARMAFLUTNINGSSAMBAND TIL ÍSLANDS.

7. apríl stóð Smyril Line Cargo saman við kommununi í Þorlákshöfn (Sveitarfélagið Ölfus) fyri stórfingnari móttøku. Fyrst varð bjóðað umborð á nýggja skipið, sum lá við nýgjørdu bryggjuna í Þorslákshöfn og síðan varð farið í býráðshúsið, har borðreitt varð við alskyns góðum mati. Nógvar røður vórðu hildnar og føroyskur tónleikur varð framførdur. Fitt av fólki var komið saman og frøin var stór millum tey, sum búgva á suðurlandinum, at hetta sambandið nú var komið. Mett verður, at hetta kemur at hava stóran týdning fyri menningina í økinum.



*Mynd 5. Nýggja farmaskipið hjá Smyrilline Mykines, sum er triðja farmaskipið hjá felagnum.*

1. apríl 2017 kom nýggja skipið hjá Smyril Line Cargo, MV Mykines, í flotan. Skipið varð bygt í Noregi í 1996. Cargo kapasiteturin hjá Mykines er 90 trailarar og 500 bilar. Skipið er eitt Ro-Ro (Roll-On/Roll-Off) skip. Mykines fer at sigla frá Þorlákshöfn fríggjadag, kemur til Rotterdam mánadag og til Tórshavnar mikudag.

Hetta fer at betra munandi um flutningsmøguleikarnar hjá Íslandi og hevur við sær, at tað verður skjótt at flyta vøru millum Ísland, Rotterdam og Føroyar. Siglingarleiðin til Rotterdam er tann stytsta siglingarleiðin hjá íslendingum. Smyril Line Cargo er fyrsta skipafelagið, ið hevur regluliga sigling til og frá Þorlákshöfn. Við at nýta Þorlákshöfn í staðin fyri Reykjavík, sparir MV Mykines uml. 8 tímar hvønn veg ella uml. 16 tímar í mun til kappingarneytarnar, sum sigla til og frá Reykjavík. Koyriteinurin millum Þorlákshöfn og Reykjavík er einans 35 min.

*Sí meira her (á Íslendskum)*

## ÍSLAND TRIÐJA GLAÐASTA LAND Í HEIMINUM




*Mynd 6. Ísland er trið glaðasta land í heiminum.*

Sambært eini kanning frá ST, World Happiness Report, er staðfest, annað árið á rað, at Ísland er nummar trý á listanum yvir glaðastu lond í heiminum.
Kanningin vísir, at 99% av íslendingum hava onkran at venda sær til, tá tørvur er á tí, og sambært kanningini, hevur hetta eina jaliga ávirkan á, hví Ísland fekk triðja plássið. Londini eru eisini mett eftir BTÚ pr. íbúgva, heilsu, hvussu lítil korruptión er innan tað almenna og í fyritøkum, frælsi til at taka avgerðir o.a. Noreg er á fyrsta plássi, Danmark er á øðrum plássi og Sveis er á fjórða plássi. Sambært kanningini, var nærum eingin munur millum hesi fýra londini. Evropeisk lond eru á teimum seks fremstu plássunum, Finnland er á fimta plássi og Holland á tí sætta.

*Sí meira her (frágreiðing á enskum)*

## FLEIRI AKFØR ENN FÓLK Í ÍSLANDI



*Mynd 7. Í Íslandi er fleiri akfør enn fólk.*

Í Íslandi er tað væl umtókt at eiga bil, og fá fólk nýta almennu farleiðirnar/flutnings tænastu. Flestu Íslendingar fáa sær koyrikort sum 17 ára gamlir, ið er aldursmarkið fyri at koyra bil. Í Íslandi eru skrásett 344.664 akfør, meðan íbúgvaratalið einans er 338.349, og tískil eru 6.315 akfør fleiri enn fólk í Íslandi ella 1,02 akfør fyri hvønn íslending. Tá eru bilar, ið ikki eru skrásettir, ikki taldir við. Í fjør vaks talið av bilum við 6%, ið er væl hægri enn talið av íbúgvum, ið einans vaks við 1,8%. Tó skal sigast, at ein partur av hesum bilum verða nýttir av ferðavinnuni (leiguakfør) og tískil ikki av íslendingum sjálvum. Til samanberingar vóru 32.824 skrásett akfør í Føroyum tann 1. januar 2016 til smá 50.000 fólk, ella uml. 0,67 bilar til hvønn føroying.

## FLAGGDAGSHALDIÐ 25. APRÍL



*Mynd 8. Løgmaður saman við forseta Íslands - Guðni Th. Jóhannesson á flaggdegnun í Reykjavík.*

Týsdagin, 25. apríl, skipaði sendistovan fyri væleydnaðum flaggdagshaldi í hugnaligu kaféini, Café Flóra, sum liggur í náttúruvakra Grasagarðinum í Reykjavík. Gestirnir fingu høvi til at smakka føroyskar brellbitar og okkurt afturvið frá Føroya Bjór. Løgmaður, Aksel V. Johannesen, helt flaggdagsrøðuna. Signar í Homrum framførdi nøkur løg, harímillum føroysku týðingina at lagnum, “Það er gott að elska” hjá Bubba Mortens.

Tað vóru umleið 180 gestir til tiltakið, bæði føroyingar og íslendingar. Flest øll sendifólkini tóku lut, fleiri ráðharrar, altingslimir og embætisfólk. Fyrrverandi forseti, Vigdís Finnbogadóttir, og núverandi forseti ,Guðni Th. Jóhannesson, møttu eisini til flaggdagshaldið.

Røðan hjá løgmanni og myndir frá tiltakinum liggja á facebook-vanganum hjá sendistovuni, The Representation of the Faroes to Iceland (sí leinkjurnar niðanfyri).

Sí meira her (røða løgmans) og her (Facebook-vangin hjá Sendistovuni)

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**

Tlf. +354 511 3200 T-postur: reykjavik@uvmr.fo
www.uvmr.fo Finn okkum á Facebook